# Hugnaløta í Miðlahúsinum við tónleiki og frásagnum

**Hóskvøldið fara Monika Stauss Joensen og Ólavur Jakobsen at framføra lættar undirhaldstónar í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Tey fara eisini at siga frá um tónleikin, tey spæla. Absalon Eliasen, skipari, sum er góður frásøgumaður, fer at greiða frá ferðamannasigling millum eitt nú Danmark og Føroyar**



*Tað er ein frægd fyri oyrað at hoyra tey spæla saman. Hóskvøldið verður høvið at hoyra Moniku á violin og Ólav á gittara í Miðlahúsinum í Vágsbotni*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

HUGNALØTA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hóskvøldið 23. februar klokkan 20 verður áhugaverd hugnaløta í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Hetta verður ein løta við tónleiki og frásagnum. Tað verða tey bæði, Monika Stauss Joensen á violin og Ólavur Jakobsen á gittara, sum fara at spæla lættari undirhaldstónar.

Skráin fyri kvøldið verður blandað við vælkendum tónum, og framførslan verður kryddað við frágreiðingum um tónleikin, tey spæla.

### Væl samanspæld

Monika og Ólavur fara at spæla tónleik eftir eitt nú Grieg, Chopin, sigoynaratónar og tangoir – ella stutt sagt; hetta verður virtuosur og lættljómandi tónleikur í Miðlahúsinum.

Monika og Ólavur hava spælt nógv saman seinastu árini. Tey hava framført um meginpartin av landinum, og tey hava eisini verið á ferð saman í USA, har tey vóru gestir hjá MAY (Music and Art for Youth). Í USA høvdu tey seks konsertir á Los Angeles-leiðini, og ávegis heimaftur til Føroyar, vóru tey eisini eitt í legg í London.

### Góður frásøgumaður

Men kvøldið í Miðlahúsinum verður meira enn tónleikur og tónleikafrásagnir.

Absalon Eliasen, sum er uppvaksin í Leirvík, men búsitandi í Havn, fer at greiða frá um ferðamannasigling millum Danmark og Føroyar.

Absalon er skipari, og hann er óførur frásøgumaður.

Á hugnaløtuni í Miðlahúsinum hóskvøldið, har øll eru vælkomnin, verður eisini kaffi og okkurt at bíta í.



*Absalon Eliasen er ættaður úr Leirvík, men býr í Havn. Hann er skipari og óførur frásøgumaður*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Eisini í Bátasavninum

**Fríggjakvøldið 24. februar fara Monika Stauss Joensen og Ólavur Jakobsen saman við Absalon Eliasen, skipara, at hava framførslu í Leirvík við tónleiki og frásøgu**

HUGNALØTA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hugnaløtan, sum verður í Miðlahúsinum í Vágsbotni komandi hóskvøld, verður uppafturtikin í Bátasavninum í Leirvík kvøldið eftir, fríggjakvøldið, 24. februar klokkan 20.

Monika Stauss Joensen og Ólavur Jakobsen fara bæði at spæla tónleik og hava frásøgu og leirvíkingurin, Absalon Eliasen, verður eisini við á tiltakinum í Leirvík.

Tónleikurin hjá Moniku og Ólavi verður í stóran mun hin sami, sum framførdur verður í Miðlahúsinum.

### Á bygd

Í Bátasavninum fer Absalon Eliasen at greiða frá, hvussu tað var at vera smádrongur og veksa upp á bygd.

Absalon hevur áður verið við í tiltøkum í Leirvík, og á einum tiltaki í Leirvíkar skúla hevði hann frásøgn um sildatíðina og tarvahald í Leirvík.

Hetta var eitt væl vitjað tiltak, og tað var sera áhugavert at hoyra skiparan greiða frá.

Í Bátasavninum fríggjakvøldið, har øll eru vælkomin, verður eisini kaffi og okkurt aftur við.

# Leirvík er í bíðistøðu

**– Vit halda ikki, at hetta er eitt partapolitiskt mál, men eitt lokalt mál, sum vit vænta stuðul til at loysa frá politikarum í Eysturoy og Norðoyggjum, sigur borgarstjórin í Leirvík**

LEIRVÍK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fríðgerð Heinesen, borgarstjóri í Leirvík, sigur, at í hesum døgum, nú landsstýrismaðurin í vinnumálum arbeiðir við at útseta framløguna av málinum um vegaloysnina í Leirvík, vita tey einki um, hvat hendir.

– Vit vita einki annað enn tað, sum fjølmiðlarnir siga okkum.

Hon heldur, at sambært samrøðuni, sum Sosialurin hevði við fíggjarmálaráðharran, Bárð Nielsen í gjár, er samgongan ikki samd um, hvussu málið um vegaføringina í Leirvík í sambandi við Norðoyatunnilin skal loysast.

– Vit halda ikki, at hetta er eitt partapolitiskt mál, men eitt lokalt mál, sum vit vænta stuðul til at loysa frá politikarum í Eysturoy og Norðoyggjum.

Sambært lógini skuldi landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, í seinasta lagi, 15. februar, leggja uppskotið um vegaføringina í Leirvík fyri løgtingið.

Ætlan landsstýrismansins hevur verið at útseta framløguna av málinum, meðan uppskotið, sum NCC saman við J & K Petersen hava gjørt, verður kannað nærri.

– Vit hava skilt, at málið er ikki lagt fram enn, hóast freistin er farin. Vit hava eisini skilt, at málið bleiv borið niðan í tingið, men síðan er borið oman aftur í Vinnumálaráðið, tí onkur feilur var í orðingini.

Fríðgerð Heinesen sigur, at Leirvíkar kommuna er í eini bíðistøðu, og tey vita einki um, hvat gongur fyri seg í løtuni.

– Vit ætlaðu at síggja málið, soleiðis sum landsstýrismaðurin ætlaði at leggja tað fram, men tað læt seg ikki gera til bygdarráðsfundin, sum var 15. februar, tí málið var ikki klárt, sigur hon.

Borgarstjórin sigur, at bygdarráðið og leirvíkingar sum heild nú bíða í spenningi eftir at vita, hvat verður burtur úr hesum máli.